# Kravdi skipara eftir ølklubbaskatti

*-Hóast eg bert dugi trý greb á einum gittara, og klári akkurát „Ja, Rasmus, og Eitt sunnukvøld í Plantasjuni," so eri eg tvær reisur í ár kravdur eftir skatti, fyri inntøku, sum eg skal hava vunnið fyri at spæla til dans í ølklubbum í Havn, sigur Suni Eliassen, skipari í Oyndarfirði*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD



*Súni, sum sjálvur heldur seg sjálvan vera totalt ómusikalskan, verður kravdur eftir skatti sum tónleikari í tónleikabólkum í Havn*

**Mynd: Edvard Joensen**

**Oyndarfjørður:** Súni Eliassen, lorvíkingur, giftur og búsitandi í Oyndarfirði, klóraði sær rættuliga í nakkanum, tá ið hann fyrst í mars í ár fekk bræv frá Toll og Skattstovu Føroya, har hann fekk at vita, at Toll og Skattstovan, í samband við eftirlitskanningar hjá klubbum, dansihølum o.ø., er komin eftir, at tónleikabólkurin Bacon hevur havt inntøku í samband við tónleikarvirksemi.

Toll og Skattstovan skrivar víðari, at hon hevur upplýsningar um, at Súni Eliassen er ein av tónleikarunum í bólkinum.

„Tað eg kenni til „Bacon" er tað baconið, sum verður brankað á eini pannu og so ikki meira. Eg tónleikari? Eg eigi gott nokk ein gittara, men eg dugi bert trý greb, C,G og F og eg klári so dánt at spæla „Eitt sunnukvøld í plantasjuni" og „Ja, Rassmus," men tá skal eg vera einsamallur. At eg enntá skal vera tónleikari í einum tónleikabólki, tað er heilt við síðuna av, sigur Suni Eliassen, sum í tí dagliga er skipari á oljuskipinum Magn, ið flytir olju millum Føroyar og Danmark.

Í tríggjar dagar var Suni Eliassen tónleikari á hesum sinni. Hann fær bræv nakrar dagar seinni, tað er dagfest 3. mars í ár, har Toll og Skattstovan orsakar mistakið . Hetta hendir eftir at Suni 2. mars í brævi hevur bedýrað yvirfyri skattavaldinum, at hann als ikki er tónleikari, hevur ongantíð verið tað og fer heldur ongantíð undir hetta yrki.

### Nýggj tilnevning

So ganga seks mánaðar, við tí heitasta summarinum menn vita um, og Suni Eliassen er skipari og alt er sum vanligt. Men eitt bræv frá Toll og Skattstovu Føroya, sent frá Eysturoyar øki, dagerað 30. august 2000, broytir enn einaferð gerandisdagin hjá skiparanum úr Oyndarfirði.

Brævið er eitt sokallað ætlanarskriv og viðvíkir sjálvuppgávuni hjá Suna Eliassen fyri 1996 og 97.

Í brævinum verður nevnt, at í samband við eftirlitsvitjan hjá skattavaldinum í ølklubbanum Tórshøll, er komið fram, at Suni Eliassen hevur havt inntøku av tónleiki frá tónleikabólkinum „Kallar". Og at hetta sambært grein 25 í skattalógini er skattskyldug inntøka.

– Eg eri totalt ómusikalskur og havi ongantíð verið limur í nøkrum tónleikabólki, enn minni tónleikabólkinum „Kallar", sigur Suni Eliassen.

– Eg vendi mær til Toll og Skatstovuna í Eysturoynni og 19 dagar seinni fekk eg skriv, har stovan játtar, at eg ikki eri tónleikari. Teir bóðu ikki eingang umbering fyri mistakið, tað kundu teir nú havt ómakað sær, sigur Suni Elliassen.

– Nú bíði eg bert eftir hvat næsta brævið hjá Toll og Skattstovu Føroya fer at snúgva seg um, sigur Suni Eliassen at enda.


VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Fiskivinnuting

**Fiskivinnuting verður í Norðurlandahúsinum 20. okt. 2000 kl. 10.00.**

Evnið á Fiskivinnutinginum er:

**Flutningur sjóvegis og loftvegis**

*– Kunnu vit fáa meira burturúr fiskivinnuni við at menna flutningskervi?*

Tilmelding í Vinnuhúsinum í seinasta lagi týsdagin 17. oktober 2000.

**Skrá:**

10.00-10.10 **Føroya Ráfiskakeyparfelag bjóðar vælkomin**
Marita Rasmussen

10.10-10.50 **Hvørjar møguleikar gevur eitt betri flutningskervi**
Andreas F. Hansen, Føroya Fiskasøla. Páll Gregersen, Fiskavirkið í Gøtu

11.00-11.30 **Uppbygging av flutningsrutu til Fjareystur**
Fred Frivåg, Maritex í Noregi

11.40-12.10 **Uppbygging av flutningsrutu til Evropa og Amerika**
Petur Eiriksson, Iceland Air Cargo

12.20-13.30 **Steðgur –** ábit

13.30-14.30 **Framtíðar flutningsmynstrið úr Føroyum**
Heðin Joensen, Smyril Line. Tórheðin Joensen, Skipafelagið Føroyar. Agnar Jensen, Eimskip

14.30-14.50 **Flogfrakt úr Føroyum**
Magni Arge, Atlantic Airways

15.00-15.15 **Steðgur –** kaffi

15.15-16.00 **Tjak**

16.00 **Samandráttur**

Orðstýrari: Helgi Jacobsen

**Føroya Ráfiskakeyparafelag**
Vinnuhúsið
Tel. 311864 • Fax 317278
T-post: fag@industry.fo

Sosialurin - 311820

Fiskivinnuting varð eitt vælumtókt tiltak, sum Fiskivinnuráðið skipaði fyri í 1980 'unum, við tí endamáli at birta til tjak í føroysku fiskivinnuni. Føroya Ráfiskakeyparafelag ætlar við hesum at taka táttin uppaftur og at skipa fyri tiltøkum undir hesum heiti. Endamálið er at savna vinnuna og stimbra til tjak, vinnuni at frama.


# Sjúkrabilur í Klaksvík settur

*Tann eini Mercedes sjúkrabilurin hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi varð ikki góðkendur av Bileftirlitinum, og hann verður ikki nýttur til útkall aftur í bræði*

STEFAN Í SKORINI

**Klaksvík:** Bileftirlitið gav sjúkrabilinum fleiri krossar, sum ber boð um, at hann hevur fleiri brek, sum skulu gerast aftur. Bilurin kann ikki nýtast til bráfeingis sjúkraflutning í tí standi, hann er í nú, og hann krevur fleiri ábøtur.

Sjúkrahúsið hevur tríggjar sjúkrabilar, men nú eru bara tveir tøkir. Tað er ikki nóg mikið til at nøkta tørvin, og portørarnir vilja heldur sleppa frá at brúka sjúkrabil við so álvarsomum breki, at hann ikki verður góðkendur. Tí verður tann sjúkrabilurin als ikki nýttur av portørunum.

Jens Jacobsen, yvirportørur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sigur, at tveir sjúkrabilar eru ikki nøktandi.

### Kostnaðarmiklar umvælingar

Av teimum trimum sjúkrabilunum hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi eru tveir teirra eldri enn tíggju ára gamlir, meðan tann triðji er nýggjur og varð keyptur í summar.

Teir báðir gomlu bilarnir eru báðir Mercedes. Hesin, sum nú ikki varð góðkendur, er tólv ára gamal. Hann hevur lagt nógvar kilometrar afturum seg. Sjúkrabilurin hevur millum 400 og 500 túsund kilometrar á teljaranum, og tá eru bilar sjáldan skikkaðir at standa fyri sjúkraflutningi.

Umvælingingarnar, sum bileftirlitið krevur, fara at kosta omanfyri tær 100.000 krónurnar, og tá er spurningurin, um tað ikki loysir seg betur at keypa ein nýggjan sjúkrabil.

– Vit meta ikki, at bilurin er verdur at gera aftur. Sjúkrabilurin er tólv ára gamal, og hevur koyrt nógvar kilometrar. Umvælingarnar fara at kosta nógvan pening, og tað eru burturspiltir pengar at umvæla bilin. Tí hava vit skrivað eina umsókn, har vit søkja um nýggjan sjúkrabil, sigur Jens Jacobsen.

Vónin er at fáa ein nýggjan bil komandi ár, tí boð eru givin um, at einki nýtt verður keypt aftur í hesum árinum.

Hin Mercedes bilurin er ellivu ára gamal og hevur koyrt eini 300.000 kilometrar. Hann varð settur í vár, tá hann hevði verið á Bileftirlitinum. Bilurin er keyptur úr Svøríki og er heldur ikki í besta standi. Hann heldur neyvan nógv ár afturat.

Tí er stórur tørvur á nýggjum sjúkrabili at taka sær av sjúkraflutningi í Norðoyggjum.

### Illa tærdur

Bilurin er gamal, og tí er hann illa tærdur í fleiri støðum. Brúgvin har frammi er illa farin og skal skiftast. Runt um búsningarnar er tørvur á ábótum. Akslarnir eru eisini tærdir.

Tá portørarnir ikki meta, at besta loysnin er at umvæla bilin, tí hann er gamal og illa farin, mæla teir leiðsluni til at keypa ein nýggjan bil í komandi ári.

Brævið við umsóknini er júst komið fram, og tí er eingin avgerð tikin hesum viðvíkjandi.

Tað ljóðar, at peningur er settur av á fíggjarlógini bara til at keypa nýggjar sjúkrabilar, og portørarnir vóna, at hesin peningur fer at koma sjúkrahúsinum til góðar.



# Reisa frystihotellið

*Frystihotellið á havnarlagnum í Kollafirði verður væntandi klárt at taka í nýtslu fyrst í komandi ári. Bygningurin verður nú reistur*



*Frystihotellið í Kollafirði verður klárt at taka í nýtslu fyrst í komandi ári*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Kollafjørður:** Høgir stálbjálkar eru komnir at standa á nýggja havnarlagnum uttan fyri Vestsalmon í Kollafirði. Tað er nýggja frystihotellið, sum verður reist.

Tað er eitt felag í Hollandi, sum saman við Janusi Norðberg úr Havn byggir frystihotellið. Janus Norðberg sigur, at grundin til, at hetta frystihotellið verður bygt, er, at teir mettu, at tørvur var á hesi tænastuni.

Tað verður rættiliga nógvur fiskur umskipaður í Norðuratlantshavi, sum ikki altíð verður avgreiddur líka rationelt, sigur hann.

Sum dømi nevnir Janus Norðberg øll skipini, sum plaga at liggja í Nolsoyarfirði. Ofta leingi í senn. Tað er rættiliga dýrt hjá hesum skipunum at liggja og bíða eftir farmaskipum, samstundis sum tað er óarbeiðsligt hjá farmaskipunum at skipa inn í Nólsoyarfirði.

Var eitt stað, har fiskiskipini kundu lagt upp og so sloppið avstað aftur beinanveg, hevði tað spart teimum nógva tíð. Samsundis hevði tað eisini verið rættiliga nógv lættari hjá farmaskipunum at lasta frá landi.

-Hesa tænastuna kunnu vit bjóða teimum um stutta tíð, sigur Janus Norðberg.

Frystihotellið í Kollafirði verður 27.000 rúmmetrar til støddar. Alt eftir, hvør vøran verður, sum goymd verður, fara eini 8.000-10.000 tons at kunna liggja á goymslu samstundis.

Verkætlanini fer at kosta umleið 21 milliónir krónur, sigur Janus Norðberg. Eini seks-átta fólk fara at arbeiða fast á hotellinum, tá farið verður í gongd. Umframt verður væl meira av arbeiði, tá lossað verður, sigur hann.

Tey, sum koyra framvið Langasandi í Kollafirði, hava lagt merki til, at bygningurin, sum reistur verður, er rættiliga høgur.

Hetta er bara ein partur av samlaða bygninginum, sigur Janus Norðberg. Tann parturin, sum nú er reistur, er 12 metar høgur, meðan lægri parturin verður átta metrar til hæddar.

At hesin parturin er so høgur, kemst av eini reolskipan, sum kann flytast. Á sama hátt sum í einum vanligum arkivi, har hillaranar verða fluttar eftir gólvinum fyri at gagnnýta alt plássið. Og hendan skipanin er rættiliga høg.

Bygningurin er gjørdur í Finnlandi og keyptur gjøgnum eina norska fyritøku, sum eisini setir hann upp.

# Steðgiforboð í J.C. Svabosgøtu



*Nú er ikki loyvt at steðga uttanfyri peningastovnarnar í J.C. Svabosgøtu, tí steðgiforboð er sett í gildi, sum skelti vísir. Enn eru fleiri, sum ikki vilja broyta gamlar vanar í bræði, men kanska løgreglan fer at hava eyguni við, um forboðið verður hildið Mynd: Jens Kr. Vang*

*Ferðsluruðuleiki er ofta í J.C. Svabosgøtu uttan fyri Sparikassan og Føroya Banka, og tað hevur ferðslunevndin hjá býráðnum nú gjørt nakað við*

STEFAN Í SKORINI

**Tórshavn:** Vanligt hevur verið, at fólk bara seta bilin frá sær sum best ber til beint uttanfyri avgreiðslurnar hjá peningastovnunum í J.C. Svabosgøtu ella sjúkrahúsvegnum, har tey skulu avgreiða síni peningaviðurskifti.

Hetta hevur havt við sær, at tað ofta er torført at sleppa ígjøgnum við bili, um bilar standa parkeraðir á báðum síðum á vegnum. Eisini koyrir bussleiðin tann vegin, og tá er mangan trongligt.

Hetta er heilt óneyðugt, tí beint hinumegin vegin eru parkeringsbásar við plássi til fleiri bilar. Høvdu fólk tímað at sett bilin í ein bás ístaðin fyri at parkera úti á vegnum, hevði eingin stórvegis trupulleiki verið. Men um fólk sleppa frá at ganga fjøruti metrar, tá tey kunnu ganga tjúgu, so velja tey heldur at fara um garðin, har hann er lægstur, sjálvt um tað samstundis er lógarbrot.

Ferðslunevndin í býráðnum hevur tí gjørt av at seta steðgiforboð í gildi allan vegin eftir J.C. Svabosgøtu frá brekkuni niðan á Frælsi til skipasmiðjuna fyri at sleppa undan ferðslutøppi, bara tí fólk skulu í sín peningastovn.

Nú hevur steðgiforboðið verið í nakrar dagar, men enn bendir einki á, at fólk ætla sær at broyta gamlar vanar. Hvønn dag standa bilar parkeraðir á vegnum beint undir skeltinum við krossinum, sum sigur frá at her er ikki loyvt at steðga. Tað verður óivað neyðugt hjá løgregluni ella parkeringsvørinum at leggja leiðina framvið, áðrenn fólk byrja at geva forboðnum gætur.

Sami trupulleiki er eisini við handilin hjá Gunleivi á Landavegnum. Munurin har er bara tann, at einki parkeringspláss er nærindis handlinum. Tá fólk skulu keypa verður bilurin eisini settur so nær handlinum sum gjørligt. Hetta er til stóran ampa fyri ferðsluna og fyri fólk, sum búgva har um leiðir, og ofta eru bilar fyri innkoyringarnar hjá fólki, hóast gular strikur eru gjørdar.


HEIMA BIO




The Beach




Mission to Mars

VIDEOTOP 10

VIKA 41

1 Three Kings
2 Double Jeopardy
3 American Beauty
4 Stigmata
5 Anna og Kongen
6 The Bone Collector
7 Jeanne d'Arc
8 Magnolia
9 Three to Tango
10 Æblemost Reglementet

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

petur & petur 320870

STATOIL
støðirnar kring landið